VIÐMERKINGAR

Umaftur Øssur

Høgni Hoydal

Sambært Øssuri Dam Jacobsen, er ein kollvelting hend í Danmark. Fimm danskir flokkar umboða nú stevnuskránna hjá Tjóðveldisflokkinum. Tað hevði nú verið hugaligt, men tíverri ber Øssur skeiv tíðindi.

Øssur Dam Jacobsen hevur í bløðunum eitt lesarabrøv um Tjóðveldisflokkin og Norðurlandaráðið, sum tíverri er bygt á beinleiðis skeivleikar og rangar upplýsingar. Hann leggur undirritaða og Tjóðveldisflokkin undir at umboða stevnuskránna hjá einum donskum flokki, tí undirritaði er varalimur í Norðurlandaráðnum vegna Norðuratlantsbólkin á fólkatingi.

Í sambandi við nevndarval í Fólkatinginum er Norðuratlantsbólkurin í einum tekniskum samstarvi við aðrar flokkar á fólkatingi um nevndarval. Júst sum tá flokkar í Føroyum gera tekniskan valbólk um nevndarval til Løgtingið.

Norðuratlantsbólkurin er í tekniskum valbólki við Sosialdemokratarnar, Kristiligu Demokratarnar, SF, Eindarlistan og Radikala Vinstraflokkin. Tað ber í sær, at nevndarsessir verða býttir eftir einum lutfalli til henda valbólk, og síðani millum flokkarnar.

Norðuratlantsbólkurin hevur í tí sambandi millum aðrar nevndarsessir fingið ein sess sum varalimur til Norðurlandaráðið. Júst hendan sessin høvdu Sosialdemokratarnir áðrenn broytingina. Tað merkir, at tá føroysk mál koma fyri í Norðurlandaráðnum - sum eitt nú umsóknin um sjálvstøðugan limaskap til Føroya, hvalaveiði ella útnorðurmál - so kann undirritaði taka sæti í Norðurlandaráðnum vegna Tjóðveldisflokkin.

Øssur Dam Jacobsen tykist halda, at politisk binding er millum limir og varalimir í Norðurlandaráðnum og millum limirnar í einum tekniskum valbólki. Altso, at ein varalimur er umboð fyri ein annan úr øðrum flokki. Hevði hann kannað málið, so hevði hann beinanvegin komið eftir, at hetta er skeivt.

Tá ein varalimur tekur sæti í Norðurlandaráðnum ella í aðrari nevnd fyri ein fastan lim, so umboðar hann bara seg og sín egna flokk. Sosialdemokraturin, sum hevði varasessin til Norðurlandaráðið, áðrenn Norðuratlantsbólkurin fekk hann, umboðaði hvørki hinar flokkarnar ella Tjóðveldisflokkin. Og undirritaði umboðar heldur ikki hinar flokkarnar, um eg stundum taki sæti í Norðurlandaráðnum. Eg umboði Tjóðveldisflokkin og kann frítt føra míni sjónarmið fram.

Var hetta ikki so, so kundi Øssur Dam Jacobsen fylt øll bløð komandi árini við at lasta Sosialdemokratar, Kristiligar Demokratar, SF, Eindarlistan og Radikala Vinstraflokkin og Norðuratlantsbólkin fyri at umboða sjónarmiðini hvør hjá øðrum í nevndum og ráðum.

Og forrestin... Um vit taka Øssur Dam Jacobsen uppá orðið og fylgja logikki hansara, so umboða allir hesir donsku flokkarnir nú eisini stevnuskránna hjá Tjóðveldisflokkinum. Tað hevði nú verið eitt stórt bragd fyri Tjóðveldisflokkin.

Men tíverri Øssur. Hendan heiður kunnu vit ikki taka á okkum. Tað manst tú eisini innast inni vita, sum fyrverandi løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin.

Danskt lykilin til fortíðina - enskt lykilin til framtíðina

Týdningur, leiklutur og framtíðin

Heidi Petersen
løgtingskvinna

Danskt lykilin til fortíðina

Nú ljóskastarin er settur á, hvønn týdning førleiki í enskum máli hevur fyri føroysk børn og ung og fyri framtíð Føroya í altjóða høpi, vil eg loyva mær at bera fram nøkur sjónarmið.

Fært hevur verið fram, at tað skal vera andsøgn ímillum tað at læra danskt mál væl og virðiliga og spurningin um, nær og hvussu nógva orku vit skulu nýta uppá at læra enskt mál væl og virðiliga.

Eftir mínum tykki er als ikki neyðugt við nakrari andsókn í hesum máli.

Tá tað í lógini er staðfest, at danskt skal lærast væl og virðiliga, er tað helst við tí ásannan og grundgeving, at nógv søgu- og familjubond eru millum bæði londini.

Men aftanfyri hesa staðfesting liggur eisini ein ásannan av, at við at duga eitt annað norðurlendskt mál til fulnar, hava vit latið dyrnar upp til øll hini norðanlondini.

Vit geva okkara ungdómi tað band ella ketu til okkara felags fortíð í norðanlondum, sum skal ankra okkum mentunarliga.

Felags søga, sagnir og sangir. Trúgv, hugsunarháttur og sosiala menningin í norðurlendsku samfeløgunum eru eisini felags eyðkenni, vit vilja læra uppvaksandi ættarlið at kenna seg aftur í og kunna kenna seg sum ein part av. Alt hetta eru virði, vit vilja varðveita, og tí er als ongin orsøk at blaka lykilin til hetta ríkidømi burtur.

Enskt lykilin til framtíðina

Hinvegin er líka greitt, at skulu vit gera okkum nakra vón um at standa okkum á altjóða pallinum innan vinnulív og mentan, er neyðugt við eini álvarsamari uppraðfesting av okkara førleika í enskum máli. Á sama hátt sum tað danska málið er lykil okkara til fortíðina og røtur okkara, verður enska málið lykil okkara til framtíðina og menningarmøguleikar sum tjóð.

Skulu vit gera okkum vónir um at kunna samvinna við allan heim á jøvnum føti við aðrar tjóðir, eru vit noydd veruliga at satsa upp á framtíðina og teir førleikar, hon krevur. Og eg ivist onga løtu í, at fyrsta innsatsøki eigur at vera ein uppraðfesting av enska málinum í føroyska skúlaverkinum.

Tað er og verður neyðugt at styrkja um førleikan hjá ungdómi okkara í enskum máli og mentan. Neyðugt verður at byrja við frálæruni í enskum eins tíðliga og við tí danska málinum. Tvs. ikki seinni enn í 3. flokki. Tímatalvan eigur at verða víðkað við 3 tímum um vikuna til ensktfrálæruna. Hetta kostar sjálvandi í undirvísingartímum, men verður hetta ikki ein spurningur um at hava ráð, men ein spurningur um lív ella deyð fyri framtíð okkara í altjóða høpi.

Niðurstøðan er greið: Danskt er og verður lykilin til fortíðina og okkara norðurlendska samleika, og enskt verður lykil okkara til framtíðina og menningarmøguleikar sum tjóð.

Entreprenør politikkurin má steðgast

Marin Katrina Frýdal
valevni Tjóðveldisflokksins til kommunuvalið í Tórshavnar kommunu

VAL04

Kommunan eigur beinanvegin at taka annað skinn um bak og raðfesta trivnaðin hjá nýbyggjarafólkum í fremstu rað. Tann ótarnaði entreprenør politikkurin kann ikki halda áfram, har tað er byggiharrin, ið hevur stýringina, buktina og báðar endarnar.

At seta føtur undir egið borð er ein íløga fyri lívið, og í høvuðsstaðnum er hetta serstakliga dýrt. Ein familja má seta seg í skuld fyri langt omanfyri milliónina; og er tað ein skuld, ið húskið kemur at merkja restina av lívinum. Tí er tað ógvuliga umráðandi, at fortreytirnar um bústaðin, eru so góðar og fullkomnar sum gjørligt, soleiðis at familjan fær fulla gleði av hesi stóru ílogu. Tað er týdningarmikið, at húsaognin er nakað, tú gleðist um og trívist í. Fyri flestøll gerst íløgan í bústaðin eisini hornasteinurin í okkara privatbúskapi. Hesir bústaðir skulu standa eftir okkum sum varðar til komandi ættarlið at taka yvir.

Tað er kommununar ábyrgd at seta karmarnar, m.a. at:

- atlit verða tikin til byggilistarliga og byggitekniska dygd
- atlit verða tikin til náttúruna, umhvørvið og uttandura umstøðurnar
- atlit verða tikin til sosialan trivnað og tørv
- atlit verða tikin til góðar ferðsluloysnir

Vit síggja nýggjar gøtur uppi á Løgmannabreyt, har støðan viðv. parkering ikki er øðrvísi enn í J. Paturssonargøtu ella í Krossgøtu, har raðhúsini vórðu bygd fyri umleið 40 árum síðani, áðrenn vanligt varð við bili í hvørjum húsi, og tiskil heldur eingi parkeringspláss.

Aðrastaðni við Løgmannabreyt eru langar røðir av raðhúsum, har tað er so illa frágingið uttandura, at ein ótast. Avgrevsturin er lagdur sum eitt stórt fjall árakað mønuna á húsunum. Hettar myrkir inni, og hyggur ein út íggjognum vindeygað, sær ein beint inn í henda skráan. Arbeiðið er so óvanda frágingið, at ógjørligt er at koma afturumaftur við amboðum.

Og upp aftur onnur, í sama nýbygda býarparti, klaga um støðugt raman kloakdeym.

Um kommunan ikki beinanvegin tekur annað skinn um bak og raðfestir trivnaðin hjá hesum nýbyggjarafólkum í fremstu rað, ja, so heldur tann ótarnaði entreprenør politikkurin áfram, har tað er byggiharrin, ið hevur stýringina, buktina og báðar endarnar. Hetta fyri stuttskygdan løtuvinning. Tað kann ikki vera meiningin, at tað eru tilvildarligir entreprenørar, ið uttan nøktandi stýring, seta dagsskránna fyri nýbygging í býnum.

Latið entreprenørarnar fáast við tað, teir eru dugnaligir til, men latið okkum fáa dygdargóðar, vælskipaðar karmar til teirra at virka undir. Tað er politiski myndugleikin í býráðnum, ið eigur at seta dagsskránna og karmarnar fyri bústaðarbyggingina í kommununi. Og tað er ábyrgdin hjá sama býráði, at kommunala fyrisitingin hevur eina vælskipaða býarplanlegging og eitt dygdargott byggieftirlit.

Eisini er tað undrunarvert, at kommunan nýtir útlendska ráðgevarafyritøku til býarplanlegging av Suðurstreymoy, heldur enn at nýta høvið at menna føroyskan førleika á málsøkinum.

Tjóðveldisflokkurin setir høg krøv til nýggjar útstykkingar, har góð bústaðarviðurskifti og trivnaður verða sett í hásæti.

ítróttur

Nr. 197 • fríggjadagur • 15. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Seinasti valsurin

Tað var ein sorgblíð løta hjá John Petersen – og fyri føroyskan fótbólt – tá hann sum seinasti maður fór av grasinum á Landsdowne Road mikukvøldið

FARVÆL
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

Dublin, Írland: Hann tóktist eitt sindur hugmóður tá dysturin í Dublin var av. John Petersen hevði undan dystinum boðað frá, at hetta var seinasta ferðin, at hann fór at vera á føroyska fótbóltslandsliðnum, so farvæl'ið til áskoðararnar eftir dystin mundi helst eisini vera nakað tungt. Sum seinasti maður stóð hann við hondunum í loft fyri føroysku fjøldini á Landsdowne Road, og tá hann skuldi fara í skiftirúmið, varð bíðað eina løtu við síðulinjuna. Líka sum vildi hann fyri eina seinastu ferð kenna rákan av altjóða fótbóltinum, áðrenn gaggurnar vórðu settar á gólvið í skiftirúminum.

Hugaligari eftir steðgin

Eftir dystin fingu vit orðið á John, og tó at kenslan sjálvandi hevði verið serlig, so var hann fegin um, at hann soleiðis fekk sagt farvæl á ein ordiligan hátt.

- Tað eri eg glaður um. Eg haldi ikki, at løtan var so tung at koma ígjognum, men eg steðgaði so líka við síðulinjuna eina løtu fyri at staðfesta, at hetta var tað.

Eins og restin av liðfeløgunum, so ásannaði John, at talan hevði verið um eina sera tunga uppgávu hjá føroyska liðnum. Ikki minst í fyrra hálvleiki, har okkara eisini tóktust hava stórar trupulleikar av hála vøllinum, sum í tímunum upp til dystin hevði verið undirdiktur í vatni.

- Sjálvur hevði eg langar dobbar undir skónum, men tað var kortini trupult at standa rætt. Somu trupulleikar høvdu fleiri av hinum á liðnum eisini, og tað kann vera, at tað var nógva vætan, sum gjørdi tað. Tað hevði annars regnað um morgunin, so tað skuldi ikki verið neyðugt at vatnað vøllin so nógv, men tað varð so kortini gjørt, helt hann.

- Og so lógu vit eisini alt ov langt frá teimum. Vit komu ikki í krovið hjá teimum, og tí fáa teir alt ov lætt spæl. Tann parturin eydnaðist betri eftir steðgin, og tó at vit ikki fingu teir stóru møguleikarnar, so var tað meira hugaligt at spæla hesi trý korterini.

Tað sá eina løtu út til, at John sjálvur ætlaði sær landsliðstroyggjuna við 10-talinum, tí hann skifti ikki um við nakran av írsku leikarunum á vøllinum. Hetta varð tó gjørt í skiftirúminum, tá hann fekk troyggjuna á John O'Shea úr Manchester United. John er sjálvur íðin United-viðhaldsmaður, og tá tað nú ikki kundi verða Roy Keane, sum hann annars hevði ætlað, so mátti talan gerast um onkran annan úr felagnum, helt John.

Frí fyri árið

Sjálvur fer John niður í næstum, og fyribils hevur hann so slettis ikki gjørt av, hvørt hann fer at spæla fótbólt.

- Í ár farið eg so ikki at spæla. Eg skal fyrst koma upp á pláss, og so fái eg at síggja, hvussu verður við fótbóltinum næsta ár, sigur John, sum heldur ikki vil siga nakað um, á hvørjum støði hann tá møguliga ætlar at royna seg.



Takk fyri! John Petersen ber seinastu heilsan sína til føroyska 12. mannin sum leikari

Eingin skomm

Jákup Mikkelsen helt eftir dystin, at hóast tap altíð eru keðilig, so hava føroysku leikararnir einki at skammast um eftir avrikið í Dublin

LEIKARAPRÁT
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

- Teir skora eftir einum korteri, og so hava teir alt fyri eitt frið til at spæla sítt spæl, samstundis sum okkara avrik í fyrra hálvleiki ikki var av tí allarbesta, heldur Jákup Mikkelsen

Dublin, Írland: Tað er einki at ivast í, at dysturin mikudagin er ein av teimum strævnu, sum Jákup Mikkelsen hevur havt fyri landsliðið. Ferð eftir ferð var hann maðurin, sum avmarkaði føroyska tapið, og sjálvur helt hann eisini, at talan var um eitt veldugt trýst, sum føroyska liðið kom undir.

- Vit høvdu roknað við, at teir fóru at koma við fullari ferð, og hjá okkum var uppleggið fyrst og fremst at halda tætt sum longst, soleiðis at teir kanska kundu frustrerast. Tann parturin av ætlanini miseydnaðist so. Teir skora eftir einum korteri, og so hava teir alt fyri eitt frið til at spæla sítt spæl, samstundis sum okkara avrik í fyrra hálvleiki ikki var av tí allarbesta, heldur Jákup.

Í so máta dámdi málverjanum betri seinna hálvleik.

- Vit royna at spæla eitt sindur meira meira eftir steðgin, men vit mugu so eisini ásanna, at teir hava eitt ótrúliga gott lið. Har eru nakrar leikarar í altjóða topp-klassa, so verður hugt at úrslitinum, so haldi eg væl, at hetta er nakað, sum vit ikki skulu skammast um.

Alla tíðina heitur

At úrslitið bleiv somikið frægt, var ikki minst Jákupi sjálvum fyri at takka. Hann hevði eina rað av stórbjarginum, og tað var eisini nakað, sum eftir dystin fekk Brian Kerr at skýra hann fyri nógv tann besta føroyska leikaran.

- Segði hann tað? Tað vist eg ikki, men tað er jú eisini so, at tá tú alla tíðina ert við í dystinum alla tíðina, so er lættari at standa væl. Tá ert tú alla tíðina ígongd við bæði armum, beinum og rødd, so tað verður lættari.

Men har vóru so eisini nakrar framúr bjargingar?

- Tað vóru tað kanska. Eg haldi eisini sum so, at tað gekk hampuliga væl í so máta.

Ein dystur eftir

Flestu av landsliðsleikarunum fóru eftir dystin mikukvøldið í vetrarferiu, men hóast Jákup eisini sær fram til hesa, so noyðist hann at bíða eitt lítið sindur afturat.

- Eg skal spæla við aðru deild hjá KÍ móti HB um upp- og niðurflyting um vikuskiftið, so tann dysturin skal fyrst spælast. Men so ætli eg mær at slappa eitt sindur av frá fótbóltinum, tó at fyrstu fyrireikingarnar til næsta ár longu fara ígongd í november mánaði, soleiðis sum eg havi skilt tað, segði altso Jákup Mikkelsen at enda.